# Heilsumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 23.09.2022 |
| Mál nr.: | |
| Málsviðgjørt: | BL |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð um broyting í kunngerð um ókeypis koppseting ímóti ávísum smittandi sjúkum

(koppseting ímóti influensu og pneumokokkum)

### § 1

Í kunngerð nr. 151 frá 29. oktober 2020 um ókeypis koppseting ímóti ávísum smittandi sjúkum, sum seinast broytt við kunngerð nr. 152 frá 3. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 5, stk. 1, 1) verður orðað soleiðis:
”1) Persónar, ið hava fylt 65 ár í seinasta lagi 15. januar 2023.”

**2.** § 5, stk. 1, 8) verður orðað soleiðis:
”8) Barnakonur í 2. ella 3. semestri.”

**3.** Í § 5, stk. 1, verður sum nýtt nr. 9) sett:
“9) Børn, ið eru fylt 2 ár, og sum ikki eru fylt 7 ár, tá ið tey fáa 1. koppseting. Børn, sum eru byrjað uppá koppseting í seinasta lagi 15. januar 2022, men mangla 2. koppseting ella eftir 1. koppseting eru fylt 7 ár, kunnu verða liðugt kopsett innan 1. mars 2023.”
Nr. 9-10 verða eftir hetta nr. 10-11.

**4.** Í § 5, stk. 1, 10), sum eftir hetta verður nr. 11), verður sum nýtt aa) sett:
”aa) Heilsutænastuskrivarar.”
aa)-dd) verður eftir hetta bb) til ee).

**5.** § 5, stk. 3 verður strikað.
Stk. 4 og 5 verða eftir hetta stk. 3 og 4.

**6.** § 5, stk. 5, sum eftir hetta verður stk. 4, verður orðað soleiðis:
”*Stk. 5.* Koppseting verður veitt børnum millum 2 og 7 ár sambært vegleiðingum frá Sundhedsstyrelsen, tað vil siga sum útgangsstøðið við einari nasalari 4-valentari influenzakoppseting.”

**7.** § 7, stk. 1, 2) verður orðað soleiðis:
”2) Persónar, sum hava fylt 65 ár í seinasta lagi 15. januar 2023.”

**8.** Í § 7, stk. 1 verða sum nr. i-m sett:
”i) persónar við diabetes mellitus.
j) persónar við kroniskari hjartasjúku.

k) persónar við kroniskari lungnasjúku.
l) persónar við kroniskari nýrasjúku
m) persónar við kroniskari livrasjúku."

**9.** Í § 7, stk. 1, verður sum nr. 6) sett:
"6) sveisarar."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi tann 1. oktober 2022.

Heilsumálaráðið, 23.9.2022

**Kaj Leo Holm Johannesen**
landsstýrismaður

/ Turid Arge